FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Umhvørvismálaráðið**
umhvorvi@umhvorvi.fo

Tórshavn 14. mars 2023

Okkara tilv./Our ref.:
4989-3973/Niels/Fxroya-FAG-B-H
Tykkara tilv./Your ref.:

## Hoyringssvar - uppskot til ll um broyting í ll um Húsalánsgrunn

Føroya Arbeiðsgevarafelag takkar fyri møguleikan at geva ummæli í s.v. ætlaðu broytingarnar í løgtingslógini um Húsalánsgrunnin.

Føroya Arbeiðsgevarafelag skilir ikki heilt tørvin á lógarbroytingini, tí eftir verandi lóg kann landsstýrisfólkið loyva Húsalánsgrunninum at fara undir verkætlanir einsamallur við fíggingini, sum er nevnd í § 8c, stk. 2, um ongin áhugi er hjá íleggjarum at vera við í verkætlanini, ella trupult er at fáa semju við íleggjarar. Við tí í huga hevur Føroya Arbeisðgevarafelag hesar viðmerkingar:

Prinsipielt heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at tað eigur at vera sett eitt nøktandi avkastkrav í s.v. verkætlanum/virkseminum hjá Bústøðum.

Vantandi avkastkrav til Bústaðir merkir, at landið stuðlar leigarunum hjá Bústøðum, meðan teir, sum leiga frá øðrum útleigarum á vanliga bústaðarmarknaðinum, ikki fáa sama stuðul.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at um tað almenna ætlar at stuðla leigarum til eina lægri húsaleigu, eiga leigarar hjá Bústøðum og aðrir leigarar at verða javnsettir, so møguligur stuðul verður veittur teimum, sum hava størst tørv á honum. Hetta kann t.d. verða gjørt við at seta í verk eina skipan við bústaðarstuðli, sum allir leigarar kunnu søkja um og fáa, um teir lúka treytirnar. Tað er torført at skilja, hví ein við høgari inntøku, sum leigar frá Bústøðum, skal fáa stuðul frá tí almenna til sína húsaleigu, meðan ein við lágari inntøku, sum leigar privat, ikki fær sama møguleika.

Harumframt kann tað hava negativar avleiðingar fyri samlaða útboðið av leigubústøðum, um privatir íleggjarar, sum skulu virka eftir marknaðartreytum, skulu kappast við ein almennan grunn, sum ikki hevur sama avkastkrav. Kappast verður tá við ójøvnum fortreytum, og hugurin at fara inn í slíka ójavna kapping er sannlíkt verri. Eisini minkar møguleikin at fáa stovnsligar íleggjarar at gera íløgur í bústaðarmarknaðin. Hetta er m.a. staðfest í frágreiðingini um bústaðarpolitisk átøk frá 2020.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur fleiri ferðir gjørt vart við, at tað er stórur mangul uppá bústaðir í Føroyum, eisini leigubústøðum, og almenni bústaðarpolitikkurin eigur at

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

skapa røttu fortreytirnar fyri at útvega bústaðir. Privatur kapitalur er ein fortreyt, um tað skal ganga nóg skjótt at fáa økt um útboðið av bústøðum í Føroyum.

Vinarliga
Føroya Arbeiðsgevarafelag

Niels Winther

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo